# Bú- og viðgerðarstovnurin Jústabrekka – Samandráttur frá eftirlitinum

Bú- og viðgerðarstovnurin á Jústabrekku er eitt bútilboð ætlað ungum fólki við menningartarni og øðrum samansettum avbjóðingum. Endamálið er, at húsfólkini skulu gerast so sjálvbjargin, sum teirra fyritreytir loyva. Íbúðirnar eru sjálvstøðugar, og felagshøli stuðla undir trivnað og felagsskap. Talan er um fyribils bútilboð og avklárandi fyriskipan, sum er eitt undanstig til antin egnan bústað ella annað hóskandi bútilboð.

**Arbeiðshættir og háttalag**
Starvsfólk nýta námsfrøðiligar tilgongdir so sum KRAP, Low Arousal og Mentalisering. Dagsskráir eru lagaðar til hvørt húsfólk, og góð nýtsla av Boardmaker skapar struktur og vísir húsfólkunum yvirlit yvir dagin. Samstarvið við psykiatriska depilin, arbeiðspláss, skúlar og onnur tilboð er væl skipað, og tilboðið hevur javnan samrøður við avvarðandi, ið tryggjar góða samskipan.

**Trivnaður og menning hjá borgarunum**
Øll húsfólkini trívast, og kontaktpersónar stuðla trivnaðinum hjá hvørjum einstøkum. Felagstiltøk so sum húsfundir, døgurðar og biltúrar menna sosialu førleikarnar. Bútilboðið leggur dent á, at húsfólkini fáa fakligan og sosialan stuðul – bæði í gerandisdegnum og í teirra virksemi uttan fyri húsið eitt nú við rørslu og frítíðarvirksemi.

**Fakliga arbeiðið hjá starvsfólkunum**
Starvsfólkahópurin er fjølbroyttur við serfrøðiligari vitan um menningartarn, autismu og námsfrøðiligar arbeiðshættir. Tó er tørvur á styrktari vitan um sálarsjúku og umsorganarsvik, eins og arbeiðið við KRAP kann verða ment. Leiðarin tryggjar supervisjón og fakligar fundir. Leiðarin arbeiðir við at bøta felags hugburð um skjalprógving í journalskipanini.

**Leiðsla og organisatión**
Eindarleiðarin hevur stuðlað staðbundna leiðaranum í at skipa bú- og viðgerðarstovnin. Staðbundni leiðarin, sum hevur viðkomandi útbúgving og leiðsluroyndir, fær jalig ummæli frá starvsfólkum fyri sín atkomiliga og lurtandi leiðslustíl. Leiðarin arbeiðir miðvíst við at menna arbeiðsgongdir og fyrireika útslúsing av húsfólkum.

**Tilmælir og áheitanir frá eftirlitinum**
Í sambandi við eftirlitsvitjanina gav Eftirlitið Almannaverkinum fylgjandi tilmælir:

*Mælt verður til, at starvsfólkahópurin tekur eina felags samrøðu um "ta góðu virkisætlanina".*

*Eisini verður mælt til at KRAP-arbeiðshátturin verður settur enn meira í spæl. Somuleiðis verður mælt til at styrkja vitanina tvørturum fakøkir og samskifti millum starvsfólk, tí tvørfakliga samstarvið sýnist avbjóðandi fyri summi. Eisini mugu starvsfólk og leiðari fáa greiðu á, hvussu "tann góða dokumentatiónin" sær út.*

*Av tí at starvsfólk merkja avbjóðingar við ymisleika viðvíkjandi samstarvi, so verður mælt til, at leiðarin fer undir sínar ætlaðu MUS-samrøður. Somuleiðis verður mælt til, at ferð verður sett á námsfrøðiliga arbeiðið við, hvussu bútilboðið skal bera seg at, tá ið húsfólk skulu útslúsast.*

**Viðmerkingar frá Almannaverkinum**
Síðani eftirlitið varð framt, eru øll starvsfólkini vorðin typutestað (Jung). Endamálið við hesum er, at tey hava møguleika at skilja hvønn annan betri, duga betri at seta seg í støðuna hjá hvørjum øðrum og harvið væntandi betra um samstarvið teirra millum.

*Eingin áheitan verður givin um, at nakað er kritiskt og má fáast í rættlag beinanvegin.*